

# Dýrd á vík og vág

Tónleikurin fyllur nógv í føroyska summarinum í gøtum og strætum, á bøum og á strondum, á festivalum og á møtum. Men summarið fyllur eisini í tónleikinum. Nógv løg finnast, ið nærum eru um at bresta av summari. Vit hava spurt nøkur fólk um teirra summarløg.

Ólavur Jacobsen er serliga kendur sum gittarúrmælingurin, ið gandar á gittarin í Aldubáruni. Hann er annað ættarlið av Kamarinum og er sostatt føddur inn í tónleikafamilju. Tónleikur eigur sostatt eitt stórt pláss í lívinum hjá Ólavi, ið arbeiðir burturav við tónleiki, sum tónleikari og sum tónleikalærari á Musikkskúlanum. Vit spudu hann, hvat hansara summarlag er?

- Summarlagið hjá mær er Dýrd á vík og vág. Ommubeiggi mín, Jens Dam Jacobsen, yrkti og setti Gunnar Mikkelsen lag til, og er tað ótrúliga væl frágingið. Yrkingin fekk upprunaliga heitið Summarmorgun, men er kendast sum bara Dýrd á vík og vág.

-Yrkingin er sjálv sera romantisk, ja, at kalla veruleikafjar fyri ein, ið er føddur og uppvaksin niðri í gomlu Havnina. Tað munnu vera fáir dagar, har ið rúmdin er "føgurblá, lotið kennist lýtt, mýrisnípan spennir sínar veingir, smálomb og hara fara spelandi um teigar."

-Onkursvegna, so er Dýrd á vík og vág ein sangur um eina farna tíð. Eitt lívsins summar, ið eisini kemur at enda. Yrkingin hevur, eins og lagið, sítt egna lív. Bæði eru vorðin tíðarleys. Hóast henda Havnin er ikki til longur, so skal eg bara hoyra sangin, so eri eg aftur í eini tíð, tá ið veðrið var nógv betri, ein sjálvur fór titandi um heygar og dagurin var langur, nærum hevði ongan enda.

Yrkingin endar við: "Gævi dagur aldri fór at halla! "

- Munnu vit ikki øll minnast ta kensluna.


www.hogv.fo

Besti føroyski ketilin



- Ótrúliga orkusparandi
- Nógv heitt vatn
- Góður fyri umhvørvi
- Dygdin er fyrsta floks

1300 føroyingar hava ein ketil frá Hógv

Hógv Ketlar

Oman á sand 15 · FO-660 Søldarfjørður

Tel 470 400 · Fax 470 401 · hogv@hogv.fo

Hógv selir og setir upp hitaverk, ventilatón og sanitet til stórar ella smáðar bygningar.

VIT SELJA:



- Brotflísar
- Náttúrusteinar
- Betongflísar
- Innandurðaflísar
- Glasbyggisteinar
- Glasmosaik
- Gasbetong
- Tilhoyr
- Urtagarðs tilhoyr

vipan

Sp/f Vípan

Víkavegur 133 • Postmoga 148 • FO-710 Klaksvík

Telefon 455161 • Telefax 455385 • kari@vipan.fo • www.vipan.fo

Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend



VHS Alt tilfar til VATN · HITAVERK · SANITET · VENTILATION

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn

Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01

E-mail: krosstein@krosstein.fo

NÝGERÐ • EFTIRLIT • UPPHÁLING



SD BEDING

FO-620 Runavík • Tel +298 449889 • Fartel +298 225105

sdbeding@post.olivant.fo • www.sdbeding.fo

Fortelt



STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna

Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo

www.stubbin.fo

So langt burtur, og tó so nær ...



GJÁARGARÐUR

Guesthouse of Gjógv

Tel. 42 31 71

Fartel. 21 15 90

info@gjaargardur.fo

www.gjaargardur.fo

FLOGFELAG FØROYA

Úr Vágum 3. aug. kl. 14:45 og heim aftur 6. aug. kl. 19:00



»THE ROLLING STONES«

konsert í Keypmannahavn

5. august fer heimskendi bólkurin The Rolling Stones á pall í Parkini í Keypmannahavn. Vit hava fingið fatur á nøkrum fáum atgongumerkjum til konsertina, so tað er um at skunda sær...

kr. 3.295,- fyri hvønn

Íroknað prísin er:

- Flogferð Vágar – Keypmannahavn og aftur við øllum avgjøldum
- Atgongumerki til konsertina hjá The Rolling Stones

P/F Flogfelag Føroya • Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn • Tel. 34 00 00 • Fax 34 00 11 • booking@ff.fo

www.ff.fo